

# Byggimálsviðgeri

Søkt verður eftir tveimum starvsfólkum til byggimálsviðgerð. Talan er um tvey fulltíðarstørv á byggi- og býarskipanardeildini.

**Høvuðsuppgávur**

- Byggimálsviðgerð
- Byggieftirlit
- At fyrireika mál, ið skulu leggjast fyri byggi- og býarskipanardeildina, og skipa fyri avgreiðslu av nevndar- og býráðssamtyktum
- Samskifta við borgarar, feløg og stovnar

**Førleikakrøv**

Umsøkjarin skal vera útbúgvin tekniskt hjálparfólk, byggiteknikari ella hava viðkomandi handverkaraútbúgving. Harumframt skipar kommunan fyri skeiðum í byggimálsviðgerð í Danmark.

Umsøkjarin skal duga væl at samskifta og helst hava kunnleika til telduforritini MS Office, AutoCad ella MicroStation, men hetta er tó ikki nøkur treyt.

**Persónligir eginleikar**

Umráðandi er, at umsøkjarin dugir væl at leggja sær arbeiðið til rættis, er fyrikomandi, kann arbeiða sjálvstøðugt og er til reiðar at luttaka í øðrum arbeiði á deildini enn omanfyri nevnt.

**Setanarviðurskifti**

Starvið verður sett skjótast til ber. Løn og setanartreytir sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Meiri fæst at vita**

um starvið við at venda sær Magna Dalsgaard, leiðara ella Mikael Viderø, býarарkitekt, tlf. 302010.

**Umsókn**

Umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar komunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin 30. oktober 2006. Viðmerk á umsóknina „Starv á byggi- og býarskipanardeildini".

Byggi- og býarskipanardeildin er partur av teknisku fyrisitingini. Á deildini starvast 4 burturav við málsviðgerð av umsóknum um byggiloyvi v. m.

Árliga verða umleið 150 ymisk byggiloyvi givin.

Vit bjóða búningsmøguleikar og góð arbeiðsviðurskifti.

Byggi- og býarskipanardeildin er í sama bygningi sum Snarskivan.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

---

FISKIMÁLARÁÐIÐ

**Lønjavningarstovan søkir 2 skrivstovufólk**

Størv sum skrivstovufólk á Lønjavningarstovuni verða hervið lýst leyst at søkja til setan frá 1. desembur 2006 ella eftir avtalu.
Talan er um eitt starv fulla tíð og eitt starv hálva tíð.

Lønjavningarstovan er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.

*Starvið fevnir m.a. hesar uppgávur:*
· skráseting av avreiðingum og mynstringum
· viðgerð og avgreiðslu av fiskivinnustudningum
· telefonavgreiðslu
· aðrar fyrifallandi uppgávur

*Førleikakrøv:*
· HH, skrivstovuútbúgving ella onnur viðkomandi útbúgving
· góð evni at samskifta við fólk
· hollan telduførleika á brúkarastøði
· góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
· góð samstarvsevni
· starvsroyndir innan líknandi starvsøki er ein fyrimunur

*Setanartreytir:*
Løn- og setanartreytir eru sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar tess, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Lønjavningarstovan.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

Til ber at ringja til Fiskimálaráðið tel 353030 og Hanni Thomsen deildarstjóri kann geva neyvari upplýsingar um størvini.

*Umsóknir:*
Umsóknir saman við avriti av prógvum, lívrensli og møguligum viðmælum, skulu vera Lønjavningarstovuni í hendi í seinasta lagi týsdagin 24. oktobur 2006 kl. 12:00.

Umsóknir skulu sendast til:

**Lønjavningarstovan**
Postsmoga 347, 110 Tórshavn

---

# Dagrøktari

**til dagrøktina á Skála**

Runavíkar Kommuna søkir eftir dagrøktara at byrja 15.11.2006.

Viðkomandi skal hava áhuga og hegni at arbeiða við børnum.

Dagrøktarheimið skal verða soleiðis innrættað, at tað er gott og trygt at spæla innan- og uttandura.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at venda sær til dagrøktarleiðaran á tlf. 586004.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi seinast mikudagin 1. november 2006.




**Dagrøktin á Skála**
Bryggjan 2
480 Skála

---

# BÁTUR TIL SØLU

Áttamannafar / vovlo penta 25 Hk. Fr-bygdur
Línuspæl – línurennu / kippara / Rullu
2 hydr: snellir- Vhf - Pappír ekkolodd
Og alla lógarkravda úrgerð. So sum
Kumpass – segl- eldsløkkjara – floytu-
Rakettir – bluss – radarreflex
Fínur at fara við 3-4 stampum.

**Báturin hevur fiskiloyvið, og er bíliga til sølu.**

**Ring 268716 ella 456716**

---

# Havnar Harmonikufelag

**Fráboðan tilstovnandi aðalfund hjá Havnar Harmonikufelag**

Boðað verður til stovnandi aðalfund, í Brúna Skúla, í Fr. Petersensgøtu 2. sunnudagin 22. oktober kl. 16.00. Áhugað, bæði íðkandi harmonikuleikarar og stuðlar, eru vælkomin á fund.